# ELDSÁLIR SØKJAST TIL FRÍSKÚLAN Í HAVN

**Hevur tú hug at**

- **arbeiða tvørgreinaligt**
- **sameina tað bókliga, handaliga, musiska, sosiala og fysiska**
- **vera við til at skapa nýggjar leiðir...**

**FGrískúlin í Havn søkir eftir tveimum lærarum til komandi skúlaár, 2009-2010.**

Frískúlin í Havn er ein skúli, sum setur næmingin í miðdeplin. Frískúlin í Havn møtir barninum, har tað er menningarliga. Skúlin virkar fyri, at barnið gjøgnum hóskandi virksemi í einum stimbrandi og tryggum umhvørvi mennist, lærir og upplivir gleði í skúladegnum. Skúlin leggur dent á at skapa ein felagsskap sermerktur av virðing og umsorgan fyri hvørjum øðrum.

Grundhugsjónin og skúlabygnaðurin eru lýst í stuttum á heimasíðu okkara www.friskulin.org.

Frískúlin í Havn sameinir skúlagongd og frítíðarvirksemi. Lærarar og námsfrøðingar arbeiða saman at skapa eitt mennandi umhvørvi fyri barnið í eini samanrenning av skúla og frítíðarvirksemi. Undirvísing er skipað í evnistímum og grundtímum. Starvsfólkini skipa fyri, at næmingarnir hava ábyrgd av praktiskum viðurskiftum í skúladegnum.

Í løtuni eru 5 starvsfólk og 32 børn í 1.– 3. flokki í skúlanum. Skúlin veksur støðugt, og skúlaárið 2009-2010 verða umleið 43 næmingar í 1.–4. flokki.

Arbeitt verður bæði í toymi saman við hinum starvsfólkunum og sjálvstøðugt; ráðlegging í samband við undirvísing er saman við starvsfeløgum og er partur av dagligu arbeiðstíðini. Arbeitt við næmingum verður bæði í størri og smærri bólkum.

Søkt verður eftir lærarum til tvey fulltíðarstørv. Arbeiðstíðin er skiftandi. Frískúlin er opin frá kl. 7.50 til 16.45.

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Frískúlanum í hendi í seinasta lagi 4. mai 2009.

Meira fæst at vita við at venda sær til skúlan tlf 32 81 50, Sharon Weiss tlf 22 86 53 ella Eyðbjørg Dalsgaard tlf 51 03 14.

**Frískúlin í Havn**
Undir Borgarhálsi 44
176 Velbastaður
tlf. 32 81 50

# SKOPUNAR SKÚLI

Skúlavegur 13 · 240 Skopun

## Lærarastarv í Skopunar skúla

Hetta starv verður lýst leyst at seta frá 1. august 2009 at rokna:

- Eitt fast fulltíðarstarv
- Avlopstímar: u.l. 14 avlopstímar – tíðaravmarkaðir til skúlaárið 2009/2010. Endaliga tímatalið verður ásett aftan á 1. sep.

**Søkt verður eftir lærara, sum:**

- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans tekur lut í dagliga arbeiðinum
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er við áhaldandi at menna skúlan

**Skúlanum tørvar lærara, ið m.a. kann undirvísa í:**

- ítrótti/ svimjing
- føroyskum, donskum og enskum
- náttúru/tøkni og støddfrøði
- søgu, kristni, heimkunnleika og tilevning

**Førleikakrøv:**
Tann, ið verður settur í starv, skal hava læraraútbúgving ella samsvarandi førleika.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt í lønarflokkunum 18.1-29.2 sambart avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Tann, ið verður settur, verður sáttmálasettur, um viðkomandi ikki frammanundan er tænastumaður í fólkaskúlanum.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvum, cv og møguligum viðmælum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi seinast mánadagin 18. mai kl. 15.

Nærri fæst at vita hjá Kathrinu Joensen, skúlaleiðara á tlf. 361696/217696 ella við at senda t-post til skúlan: skopunsk@post.olivant.fo

**Í SKOPUNAR SKÚLA** eru 33 næmingar og áleið 3 lærarastørv komandi skúlaár. Næmingarnir eru úr 1. upp til og við 5. flokk. Arbeitt verður støðugt við at menna skúlan.



# Porkeris skúli

**Søkt verður eftir einum lærara til tíðaravmarkað parttíðarstarv skúlaárið 2009/2010.**

Starvið er uml. 16 tímar vegna lærara í farloyvi. Endaliga tímatalið verður ásett í september.

**Umsøkjarin skal m. a. kunna átaka sær undirvísing í:**

- Enskum
- Handaligu lærugreinunum
- Kristni
- Heimstaðarlæru

**Søkt verður eftir lærara, sum:**

- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Duga at samstarva og eru fyrikomandi
- Vera fúsur at taka á seg tær uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum
- Vera við til at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 29.2.

Søkt verður eisini eftir stuðulsfólki til skúlaárið 2009/2010 til næming við serligum tørvi.

Starvið er 25 klokkutímar um vikuna.

Fyrimunir hava umsøkjarar við royndum og viðkomandi útbúgving.

Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi, opin fyri samstarvi við bæði leiðslu, lærarar, næmingar og foreldur.

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlaleiðaranum Mannbjørn Olsen, Hólavegur 15, Porkeri, í hendi í seinasta lagi týsdagin 12. mai 2009 kl. 12.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran, Mannbjørn Olsen, tlf. 37 32 53 ella 26 28 64.

## Raðhús í Hoyvík til sølu

Raðhúsini Jørundargøta 27 Hoyvík til sølu um hóskandi boð fæst

Húsini hava sera gott útsýni yvir Havnina og Nólsoyarfjørð

Vakur umgyrdur havi við lítlum úthúsi er niðanfyri húsini

**Tel. 226500**




Kom og steðga vónloysinum

Kom og ver við at fría samvitskufangar, forða avrættingum og steðga píning. Kom og Skriva fyri lívi.

amnesty international
www.amnesty.fo





Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo